# Føroyar eittans valdømi -og hvat so?



TORFINN SMITH

Eftir miklan tvídrátt um tað var rætt ella skeivt at skipa Føroyar sum eittans valdømi, er veruleikin nú, at Føroya Land nú er eitt og sama valdømi. Tí er spurningurin ikki, um tað var rætt ella skeivt, men vit mugu bert halda okkum til henda sanna veruleika. Spurningurin er, hvørjar avleiðingar hetta fær, í mun til gomlu skipanina við sjey valdømum.

Tað var hildið at vera stór dygd hjá valevnum at tekkjast veljarum í heimligum bygdarumhvørvi. Lítillætna agitatiónin fór fram niðri í mølini ella undir neystavegginum. Menn prátaðu saman um tað, gerandisdagurin beyð bygdarfólkinum, um veður og vind, og tað sum fekst úr haga ella sjónum. Fólkið valdi bygdarmannin, alt eftir hansara skili og viti, og hvat rørdi seg í teirra umhvørvi. Sanniliga vórðu grundleggjandi politisk sjónarmið væl og virðiliga viðgjørd, og tí vistu fólk eisini, hvat hann ella hon stóð fyri politiskt hugsjónarliga. Sjálvstýrismaður ella sambandsmaður, borgarligur ella sosialistur. Her var tikið atlit bæði fyri, hvat tænti bygdini ella oynni best, og ikki minni hvat best tænti heildini.

Her var talan um nærdemokrati. Her var talan um, at fólk tóku eitt valevni til sín, sum tey hildu kundu tala sína søk, lokalt og hugsjónarliga.

Agitatiónin undir neystavegginum er fánað burtur. Nærdemokratiið er horvið. Bygdarmaðurin, sum fólk áður hildu seg til, er í dag ikki hin sami, tí fjarstøðan millum tey, vit kalla vanliga fólkið og hini, sum veljast skulu, er munandi økt.

Nú eru Føroyar eittans valdømi, og føroysu politiklararnir eru knappliga vorðnir landspolitikarar. Ella skulu látast at vera tað.

Kann væl vera, at vit sleppa undan einum parti av trongskygdum lokalum áhugamálum, men spurningurin er, hvat vit hava fingið í staðin.

Tað, vit síggja í dag, í mun til fyri bert nøkrum fáum árum síðani, er, at vit hava fingið amerikanskar tilstandir. Allir flokkar nálgast miðjuni, og áður høgt mettu idiologisk virði og mørk kámast.

Flokspolitikkurin má lúta fyri persónligari valdsgreði. Fá eru tey valevni, sum longur siga, frá hvat flokkur hansara ella hennara stendur fyri. Nú ræður um at profilera seg sjálvan. Vit drukna í meira ella minni fjákutum persónsmyndum, sum eitt ivasamt prýði fjala heilar húsafasadur, heldur enn partapolitiskum boðskapum.

Neyvan er rætt at geva nýggju valskipanini skyldina fyri alla broytingina, men lítið er at ivast í, at hon meðvirkar til at skunda undir nýggja rákið. Rákið, har hvassir albógvar avloysa politiskar hugsjónir. Uttan mun til hvørja valskipan vit hava, mugu vit í dag ásanna, at tað eru ikki politikararnir, men í nógv størri mun lýsingarstovurnar, sum seta dagskránna.

Tað skal tí vera mín vón, at fólk ikki lata seg ørkymla av glantrileikinum, men lata sítt egna vit og skil ráða og atkvøða eftir bestu ideologisku sannføring. Gott val.




